## Eingin útskifting í Heimahjálparafelagnum

Forkvinnan í Heimahjálparafelagi Føroya, Ása Olsen, varð einmælt afturvald til formanssessin um vikuskiftið, tá felagið hevði aðalfund. Hetta er fimta valskeið hjá Ásu Olsen. Bert ein nýggjur limur er komin í nevndina hjá Heimahjálparafelagi Føroya. Tað er Gurið Klein, sum er komin í nevndina fyri Hildugarð Djurhuus, ið ikki stillaði upp aftur.

- Limirnir eru væl nøgdir við nevndina, og hetta kemst av, at tað gongur væl fíggjarliga. Tá eg kom til í 1996, tá var felagið illa fyri fíggjarliga. Men vit hava havt eina neyva fíggjarstýring í nøkur ár, og nú hava vit onga skuld, sigur Ása Olsen, afturvald forkvinna í Føroya Heimahjálparafelagi.

Høvuðsinntøkan hjá Heimahjálparafelagnum kemur frá limagjøldum, og ongin peningur kemur frá tí almenna. Heimahjálparafelag Føroya varð stovnað í 1979, og tá felagið fyllir árið tann 26.mai, verður opið hús í Fr. Petersensg. 7 í Tórshavn.

**hkm**

## Nýggjur vøllur á Svangaskarði

Útskifting og endurnýgging av føroysku graslíkisvøllunum kring landið tykist ganga væl. Nýggjasti vøllurin í Føroyum verður nú tann á Svangaskarði, sum ætlandi skal takast í nýtslu komandi vikuskiftið. Graslíkisteppið á Svangaskarði er tað elsta, sum higartil hevur verið í brúk, men fyrsti graslíkisvøllurin í Føroyum varð tann í Gundadali. Tað er fyritøkan Polytan, sum leggur nýggja undirlagið á. Henda sama fyritøka skal eisini leggja nýtt lag á vøllin í Vági. Seinni er tað felagsvøllurin hjá EB /Streymi í Streymnesi, sum fyri fyrstu ferð skal fáa graslíkisundirlag.

**hkm**

## Triton tók sær av íslendingi

Fríggjadagin boðaði íslendska fiskiskipið Askell frá, at teir høvdu ein skaddan mann umborð. Íslendski maðurin hevði trupulleikar av hondini. Tað var Tórshavn Radio, sum fekk boðini klokkan ellivu um morgunin frá skipinum, sum lá sunnan fyri Føroyar. Tórshavn Radio setti seg beinanvegin í samband við Triton, sum var á leiðini, og løtu seinni tók manningin á Triton íslendska mannin umborð. Bein kós varð sett ímóti høvuðsstaðnum, har íslendski maðurin varð innlagdur seint seinnapartin fríggjadagin.

**hkm**

## Grindabátar á flot



Sunnudagin drógu vágbingar knørr úr neysti. Gomlu grindabátarnir komu aftur á bylgjuna bláu og siglt var við seglum á fjørðinum. Eitt lítið lot og annars gott veður gjørdi løtuna hugtakandi. Kappróðrarbátarnir hjá Vágs Kappróðrarfelag tóku eisini lut í siglingini, sum kom í lag, tí fólk frá Víkingaskipasavninum í Roskilde eru á vitjan í Føroyum í hesum døgum. Vitjað varð eisini vesturi á Eiðinum í Vági, har róð hevur verið út. Á kvøldi var fyrilestur í Stóra Pakkhúsi og mánadagurin var millum annað ætlaður vitjan í Hvalba.



*Hesin pelin varð javnaður við jørðina leygarnáttina, tá ein fullur maður rendi á pelan og ein mann*

*Mynd: Eirikur Lindenskov*

# Koyrdi fullur á fólk og pela í miðbýnum

**Sunnunáttina koyrdi ein fullur maður á ein pela og eitt fólk í gongugøtuni í Havn. Tvey onnur ferðsluóhapp vóru, og í báðum førum var rúsdrekka uppií**

FERÐLSUÓHAPP
*Eydna Skaale*

Sambært løgregluni vóru trý ferðsluóhapp leygarnáttina. Í øllum trimum førum var talan um rúsdrekkakoyring. Bert í einum føri var nakað av fólkaskaða.

Við Statoilstøðina í Kollafjarðardali fór ein bilur útav vegnum. Bilførarin var framvegis á staðnum, tá løgreglan kom. Tað vísti seg, at førarin var ávirkaður av rúsdrekka, at hann var ov ungur at koyra og at hann eisini hevði stolið bilin, hann koyrdi í. Bilurin fór sera illa. Vakthavandi sigur, at ungi bilførarin kann vænta sær eina stóra bót, og hann skal møguliga eisini inn at sita.

Fólk, sum koyrdu framvið í Kollafjarðardali, eftir at politii hevði tikið føraran við sær, søgdu, at rundan um bilin var eitt forferdiligt órudd. Barnatekningar, bamsur og annað lá og sløddist á staðnum. Sagt varð, at alt varð frágingið í einum hurlivasa. Løgreglan hevur onga viðmerking til hetta.

Leygarnáttina ringdi ein kona í eysturbýnum í Havn til løgregluna, og meldaði ein bilførara. Hesin hevði rent á garðin hjá henni, og hevði, á veg inn í garðin, tikið í ein pela. Løgreglan kom á staðið og tók føraran. Hann verður nú skuldsettur fyri rúsdrekkakoyring.

Í miðbýnum í Havn hendi eisini eitt ferðsluóhapp leygarnáttina. Ein bilur fór við nógvari ferð oman gjøgnum gongugøtuna, har hann rendi á ein lyktapela uttan fyri Føroya Banka. Pelin varð boygdur heilt niður, so hann lá flatur eftir vegnum. Glaskúpan, við peruni í, varð føst inni undir bilinum. Eisini hesin bilførarin var ávirkaður av rúsdrekka.

Sjónarvitni siga tó, at bilurin ikki bert rakti pelan, men eisini ein ungan mann á vegnum. Hann varð slongdur upp á motorhjálmin og niður aftur á ein bonk, sum stóð har. Sjúkrabilurin tók hann við út á sjúkrahúsið til kanningar. Eingin álvarsamur skaði hendi við honum. Bilurin varð standandi í miðbýnum alt flaggdagshaldið, men er nú fluttur. Løgreglan hevur lítlar og ongar viðmerkingar til hendingina.

# Lærarafelagið sigur upp

AÐALFUNDUR
*Hans Kárason Mikkelsen*



*Nevndin í Føroya Lærarafelag: Tórfinn Højgaard, Páll Poulsen, Johnnes Eli Iveren, formaður, Magnus Tausen og Martin S. Eidesgaard*

Høvuðsavtalan hjá Føroya Lærarfelag við Fíggjarmálaráðið skal sigast upp. Tað gjørdist greitt á aðalfundi felagsins um vikuskiftið, tá ein meiriluti av teimum, sum møttu á aðalfundinum, ynsktu at siga avtaluna upp.

- Orsøkin er, at fólk eru ikki nøgd við høvuðsavtaluna. Tað stendur í avtaluni, at tá hon verður søgd upp, so skulu samráðingar um eina aðra avtalu byrja, sigur Jóhannes Eli Iversen, formaður í Føroya Lærarafelagi.

Uppsagnartíðin er seks mánaðir, og Jóhannes Eli Iversen sigur seg vóna, at ein nýggj høvuðsavtala kann fáast í lag áðrenn tað. Um tað ikki ber til at samráða seg til eina nýggja avtalu, so er tann gamla avtalan enn í gildi. Tískil kann tað enda við, at Føroya Lærarafelag ikki fær eina nýggja avtalu.

- Tað er ikki til at siga enn, hvat fáast kann burturúr. Nevndin hevur ikki havt fund um hetta enn, men trupulleikin verður tikin upp, tá nevndin kemur saman aftur næstu ferð, sigur Jóhannes Eli Iversen, formaður í Føroya Lærarafelag.

Onki val varð á aðalfundinum um vikuskiftið, men næsta ár er nevndarval á skránni í Føroya Lærarafelag.



# Søren Gade nýggjur verjumálaráðharri

**Leygardagin varð Søren Gade útnevndur til nýggjan verjumálaráðharra eftir Svend Aage Jensby, sum fríggjadagin valdi at fara frá. Men ein møgulig niðurlegging av radarstøðini í Føroyum er enn á dagsskránni hjá danska verjumálaráðnum - Gade hevur nevniliga sjálvur verið við til at sett hana har**

VERJUPOLITIKKUR
*Rúnar Reistrup,*
*Keypmannahavn*
*runar@reistrup.com*



*41 ára gamli Søren Gade er majorur í danska herinum og hevur útbúgving sum búskaparfrøðingur.*

*Mynd: Rúnar Reistrup*



*Anders Fogh Rasmussen var júst afturkomin til Danmarkar av eini uttanlandsferð, tá hann fríggjakvøldið fekk boðini frá Svend Aage Jensby, um at hesin tók seg aftur sum verjumálaráðharri. Longu leygardagin á middegi stóð hann uttanfyri Amalienborg við sínum nýggja verjumálaráðharra Søren Gade*

*Mynd: Rúnar Reistrup*

Fyri fyrstu ferð síðan Anders Fogh Ramsussen skipaði stjórn noyddist hann leygardagin at taka ráðharrasvinghurðina á Amalienborg í nýtslu.

Tann nú fyrrverandi danski verjumálaráðharrin, Svend Aage Jensby fór inn til drotningina kl. 12.05 at biðja hana loysa seg úr starvi. Kl. 12.30 fóru forsætisráðharrin og Søren Gade so inn til drotningina at biðja hana seta Gade sum nýggjan verjumálaráðharra.

### Nýggjur í politikki

41 ára gamli vinstramaðurin Søren Gade er ikki nakað serliga kent andlit í donskum politikki. Hann kom fyrstu ferð inn á Fólkating eftir valið í 2001 og hevur síðan sitið sum næstformaður í Fólkatingsins verjunevnd. Donsku verjuna kennir Søren Gade eisini innanífrá - hann er nevniliga majorur.

### Umskipa verjuna

Fyrsta stóra uppgávan hjá nýggja verjumálaráðharranum verður at føra arbeiðið við at umskipa donsku verjuna víðari. Í einum uppleggi um framtíðarætlanir við donsku verjuni verður staðfest, at verjupolitiska støðan er broytt so mikið, at neyðugt verður við einari umfatandi umskipan av donsku verjuni.

Hendan umskipan ber millum annað í sær íløgur í tríggjar nýggjar kavbátar og aðra kostnaðarmikla útgerð. Til at fíggja hesar íløgur leggur stjórnin upp til at endurskoða verandi tilbúgvingarskipan og í hesum sambandi at umhugsa at niðurleggja radarstøðina á Sornfelli.

### Føroyingar á Fólkatingi spurnir

Hetta hevur fingið báðar teir føroysku fólkatingslimirnar til at reisa fyrispurningar í Fólkatinginum um framtíðina hjá radarstøðini.

Lisbeth L. Petersen úr Sambandsflokkinum spurdi í farna mánaði táverandi verjumálaráðharran, um hann kundi tryggja, at radarstøðin ikki varð niðurløgd um so var at NATO var ímóti hesum. Til hetta svaraði Svend Aage Jensby, at NATO í framtíðini væntandi fór at minka um stuðulin til rakstur av radarstøðini á Sornfelli, og slerdi fast, at danska verjan ikki longur hevði radarstøðina fyri neyðini í síni tænastu.

Herfyri spurdi so hin føroyski fólkatingslimurin, Høgni Hoydal úr Tjóðveldisflokkinum, verjumálaráðharran, um hann kundi upplýsa, hvør fer at verja Føroyar í einari møguligari kreppustøðu og setti harvið sítt spurnartekin við ætlanina um at niðurleggja radarstøðina á Sornfelli. Hesin spurningur er enn ikki svaraður av Fólkatingsins røðarapalli, og tískil verður hetta millum fyrstu uppgávurnar hjá nýggja ráðharranum.

### Føroyingar tiknir uppá ráð

Bæði í upplegginum um framtíðarætlanir við donsku verjuni og í svarinum hjá Svend Aage Jensby til Lisbeth L. Petersen stendur greitt skrivað, at Føroya Landsstýrið skal takast uppá ráð í avgerðini um hvat henda skal við radarstøðini á Sornfelli.

Men føroyingar skulu ikki gera sær vónir um at ætlanirnar hjá donsku stjórnini eru broyttar við tað at ein nýggjur maður stendur við róðrið í verjumálaráðnum.

- Eg standi fult og heilt inni fyri upplegginum hjá stjórnini. Eg havi sjálvur verið við til at skrivað tað, segði Søren Gade beint sum hann stóð sum nýútnevndur verjumálaráðharri á Amalienborg Slotsplads.

Danska stjórnin vil hava eina breiða semju um umskipanina av donsku verjuni, og tí verða samráðingar í næstum førdar við hinar stóru flokkarnar á Fólkatingi, har roynt verður at finna fram til ein leist, sum ein stórur meiriluti kann ganga við til.

## FAKTA

Brot úr verjupolitiska upplegginum hjá donsku stjórnini, sum varð almannakunngjørt í farna mánaði:

"Grønlands Kommando og Færøernes Kommando fortsætter som selvstændige myndigheder tilpasset den aktuelle udvikling i forsvarets opgavekompleks i Nordatlanten. Det overvejes i samarbejde med NATO og under inddragelse af Færøernes Landsstyre at nedlægge radarstationen og flåderadioen på Færøerne."

